gult cyan magenta svart





# Jólaskipið í Klaksvík

Í dag kl. 18.00 kemur jólaskipið á Klaksvík. Hetta er áttanda árið á rað, at Jólaskipið vitjar Klaksvíkina.

Skipi,ð sum verður væl skrýtt, siglur so langt inn, sum tilber og haðani fara jólamenninir niður í smærri bátar, sum so sigla teir móti landi.

Jólamenninir koma upp á land niðan fyri Kappróðarneystini.

Klaksvíkar Kappróðrarfelag skipar fyri kaffisølu og øðrum ímeðan fólkini bíða. Tá jólamenninir eru komir upp á land, verður farið í skrúðgongu niðan í Vágstún.

Í skrúðgonguni verða hornorksetur skótar og nissugentur á hestbaki. Tá skrúðgongan er komin niðan í Vágstún, verða jólaminninir bodnir vælkomir til Klaksvíkar og felagssangir verða sungnir. Tiltakið endar við, at øll børnini fáa ein jólapakka í part.

Seinasta ár stovnaðu fyrireikarnir av jólaskipinum ein grunn, sum verður nevndir jólaskipagrunnurin. Hesin grunnur hevur til endamáls at veita fíggjarligan styrk til fólk, sum av vanlukkutilburi, sjúku, ella øðrum ávum eru komin illa fyri fíggjarliga og hava ein átrokandi tørv.

Fyrireikarnir siga í tíðindaskrivi, at øll eru vælkomin at seta pening í henda grunn. Grunnurin hevur konto í Føroya Banka og Norðoya Sparikassa.

**VIÐMERKING**

# Høgni - tað var jú tú, sum bluffaði

**Jóannes Eidesgaard**

Tað fer einki av einum manni, tá hann viðgongur, at hann hevur mistikið seg. Nú hevur Høgni Hoydal havt møguleikan síðan mánadagin at rætta sítt mistak, men hann rættar einki og letur bert ósannindini standa við.

Leitar tú inn á heimasíðuni hjá Tjóðveldisflokkinum, so finnur tú grein við heitinum "Nýskipan og sjálvstýrislógir gjørdar til bluff." Greinin er skrivað av professionella greinskrivaranum Høgna Hoydal og er dagfest 15. nov. 2000. Eg veit ikki, um hon telist millum úrvalsgreinirnar í nýggju bókini "Frælsi er ábyrgd," men eitt veit eg, og tað er, at sannleikin er eisini ein ábyrgd. Lygnin er ábyrgdaleys, meðan sannleikin er ábyrgdarfullur.

Í nevndu grein kemur greinskrivarin til ta niðurstøðu, at sjálvstýrislógin er tað reina bluff, tí tað hevur danska stjórnin sagt undir seinastu samráðingunum 26. okt. 2000. Hann sigur m. a., at tað er synd í teimum flokkum, sum hava bygt sín politikk á ríkisfelagsskapin. Um okkara uppskot um eina sjálvstýrislóg sigur Høgni Hoydal, at hon er ein luftkastella, veruleikafjart dreymatos, ynskidreymar, sum danska stjórnin hevur skotið niður sum sápubløðrur.

Hann endar nevndu grein við at endurgeva Sjúrða Skaale fyri at siga, at sjálvstýrislógin er "Fupp og svindil". Hesin sami er í dag pressutalsmaður hjá landsstýrinum.

Og ikki nóg mikið við hesi góðu grein, so trein Høgni Hoydal esini fram á sjónvarpsskuggan og feldi endaliga dómin yvir sjálvstýrislógina. Hon ber snøgt sagt ikki til, ljóðaði dómurin.

Sjálvandi sótu mong av okkara fólki og ivaleyst eisini onnur, sum vóru sera hugstoytt av hesum, sum varaløgmaður endutók bæði í skrift og í talu. Og uttan iva hava mong hugsað sum so, at tað er nú ikki ein og hvør, sum sigur hetta, so okkurt er ivaleyst um hetta. Og tað var júst endamálið hjá varaløgmanni. Sáa ivan, so var slottið vunnið.

Tískil tók eg stig til at seta forsætismálaráðharranum tveir skrivliga spurningar, sum hann svaraði skrivliga mánadagin. Men nú hava hvørki Høgni Hoydal ella fjølmiðlarnir sama áhuga í málinum longur, tí nú tænir svarið ikki endamálinum. Væl vitandi um, at hetta lætt kundi gerast úrslitið, so setti eg eisini ríkisumboðsmanninum somu spurningar, so vit kunnu fáa eitt orðaskifti á tingi um hesi viðurskifti.

Fyrri spurningur var, um sjálvstýrislógin kundi vera grundarlag undir ríkisrættarligu viðurskiftinum millum Føroyar og Danmark? Her svarar forsætismálaráðharrin m.a. soleiðis: "Jeg opfatter rigsfæl-lesskabet som et fællesskab mellem ligeværdige parter, mellem tre ligeværdige folk, det færøske, det grønlandske og det danske med klare rettigheder og pligter for alle." Víðari sigur danski forsætismálaráðharrin: "Efter regeringens opfattelse vil der være ganske store og konstruktive muligheder at udvide og forme et fremtidigt færøsk selvstyre på en ny og anderledes måde inden for rammerne af rigsfællesskabet. En sådan samlet ordning må bl.a. omfatte både lovgivningsmæssige, forvaltningsmæssige og økonomiske spørgsmål."



Seinni spurningurin var um heimildirnar hjá Løgtinginum? Her sigur forsætismálaráðharrin: "Selvstyre kan på samtlige de sagsområder, der overtages, få overladt den lovgivende og administrative kompetence. Endvidere vil nyordningen statsretligt kunne forankres i et princip om uigenkaldelighed - og dermed i et princip om selvstyret som øverste myndighed på de overtagne områder."

Júst hetta brotið er ein endalig uppgerð við gamla stríðsmálið um "delegatiónina". Løgtingið verður á henda hátt hægsti myndugleiki í øllum yvirtiknum málum, og hesa heimild kann eingin myndugleiki taka frá Løgtinginum.

Eg skuldi kanska eisini nevnt, at forsætismálaráðharrin sigur: "Det vil kunne meddeles alle FN´s medlemslande, at det nuværende hjemmestyre afløses af et nyt selvstyre."

Javnaðarfólk og øll onnur hava við hesum svari fingið greitt at vita, at tað, sum er ført fram um, at okkara sjálvstýrislóg er ein sápubløðra og tað, sum verri er, ikki er sannleikin. Sannleikan fingu vit svart upp á hvítt mánadagin, og hann er nóg mikið fyri okkum til at halda áfram í stríðnum fyri at fáa eina skilagóða loysn av ríkisrættarliga spurninginum.

Eg fari hóast hetta ikki sum onkur annar at krevja Høgna Hoydal eftir einari treytaleysari umbering fyri sínar skeivu útleggingar og ósonnu tulkingar, men nú jólafriðurin leggur seg um landið, fór einki av honum, at hann viðgekk sítt mistak.

Gleðilig jól.

# Viðmerking til málið um tyrlutilbúgving

**Magni Arge**
*stjóri, Atlantic Airways*

Í samband við umrøðuna av lógaruppskotinum um tyrlu tilbúgving í Føroyum, bæði á tingi og í fjølmiðlum, harmar tað meg, at tað er sáddur ein illgruni um motivini hjá Atlantic Airways í hesum málinum.

Eitt nú er spurningur settur við, hvørt prísurin er í lagi, meðan fleiri hava róð upp undir, at rættari var at bjóða tilbúgvingina út millum fleiri aktørar og spurnartekin er sett við, hvørt hetta er tann rætta tyrlan.

Onnur hava ført fram, at talan er um at lóggeva stuðul ella veðhald beinleiðis til felagið, meðan onkur annar tosar um fjalda bjargingarætlan fyri tyrlutænastuna.

Lat okkum gera púra greitt, at Atlantic Airways hevur einki ímóti, at Fiskimálastýrið kannar prísir frá øðrum tænastuveitarum, og heldur ikki fara vit at seta okkum ímóti, at tilbúgvingin verður boðin út.

Tað fara altíð at verða fleiri meiningar um, hvør tyrlan er tann rætta til uppgávuna. Fiskimálstýrið setti ein bólk, við umboðum frá ymsum stovnum og stýrum, sum síðani mælti til tað valdu loysnina. Hesa kunnu vit ikki annað enn taka til eftirtektar.

Sáttmálin um leiti- og bjargingartænastuna (SAR tænastuna), sum Fiskimálastýrið og Atlantic Airways hava samráðst um - men ikki undirskrivað – bindir Atalntic Airways til at gera eina íløgu uppá umleið 55 milliónur krónur til keyp av eini serútgjørdari tyrlu. Til



tess at forrenta eina tílíka íløgu, krevst ein sáttmáli yvir fleiri ár, men afturfyri binda vit okkum til at standa tilbúnir innan ein tíma hvønn dag í tíggju ár.

Kapitalkostnaðurin saman við tryggingarkostnaðinum svarar til á leið níggju milliónir krónur um árið. Fiskimálastýrið fær eisini 170 flúgvitímar árliga við í prísium. Til at veita hesa tænastu skulu setast fleiri pilotar og mekanikarar, sum allir skulu útbúgvast og javnan venja og uppdatera sín førleika. Umframt hetta skal Atlantic Airways sjálvsagt eisini rinda fyri umsiting og annan rakstrarkostnað.

Vit meta ikki, at hendan verkætlanin einsamøll gevur stórt fíggjarligt íkast í fyrsta umfari, men seta kortini okkara álit á, at felagið í longdini kann fjøltátta búskaparliga grundarlagið við teirri vitan og førleika, sum hendan verkætlanin kann geva felagnum.

Innanhýsis í felagnum er stór orka løgd í at menna tyrlutænastuna seinastu árini. Tað er mín fatan at starvsfólk og felag hava sýnt bæði góðan vilja og áræði til tess at skipa eina føroyska tyrlu tilbúgving, við støði í teimum umstøðum, sum vit hava at virkað undir.

Men tað tænir hvørki umdøminum hjá Atlantic Airways ei heldur motivatiónini hjá starvsfólkunum, at so nógvir ivi er sáddur um rættleikan í verkætlanini.

Tí hava vit eisini mælt myndugleikunum til at brúka ta tíð og tær kreftir, sum eru neyðugar til tess at rudda burtur ivan. Hevur hetta við sær, at tilbúgvingin verður boðin út, ella myndugleikarnir kanna prísir frá øðrum veitarum, so góðtaka vit hetta treytaleyst.

Blíðar heilsur

# Aria aftur á pall

KONSERT
*Tíðindaskriv*

2. jólakvøld fer vælumtókti klaksvíksbólkurin Aria á pall í ítróttarhøllini á Kambsdali.

Nú er nakað síðan at klaksvíksbólkurin, Aria, hevur verið á palli seinast. Men 2. jólakvøld verður so aftur møguleiki at hoyra frálíka tónleikabólkin, tá teir trína á pallin í ítróttarhøllini á Kambsdali í samband við stórt dansitiltak. Og tað lovað tónleikararnir, at tað verður. - Aria fer at spæla fjølbroyttan dansitónleik, ætlandi bæði tí yngra og tí eldra ættarliðnum. Tey góðu og kendu heimagjørdu løgini verða at hoyra. -Tann góði og altjóða kendi dansitónleikurin, sum tónleikararnir í Aria eru óførir í at framføra, verða eisini á skránni, umframt okkurt jólalag.

Vanliga plaga nógv fólk at koma í dans 2. jólakvøld, og fyrireikararnir vóna, at í ár verður einki undantak. Og tónleikararnir skuldu í øllum førum gjørt sítt til, at mong fólk verða at síggja í ítróttarhøllini á Kambsdali 2. Jólakvøld. Er áhugi millum klaksvíkingar í Klaksvík, at uppliva ARIA á Kambsdali 2. jólakvøld, so kann hetta lata seg gera. Fyrireikararnir hava nevnliga gjørt avtalu við Alfa Pilot um at sigla millum Klaksvík og Leirvík í samband við dansin. Alfa Pilot siglur tó bert um nóg stór undirtøka er fyri tí og sjálvsagt eisini um veðrið verður til vildar. Lýst verður nærri seinni.

Dansitiltakið á Kambsdali 2. jólakvøld byrjar kl. 23.00.

# hygg & hoyr



Frá fríggjadegi 22. desember til hósdagin 28. desember

## Sjómanssendingin: Vitin



*Leygardagin kl. 17 verður sjómanssendingin Vitin aftur á skránni.*

*Fimm mans fara at vera í útvarpsstovuni í Bøkjarabrekku. Teir fara at hugleiða um jólini og um munin millum at vera á sjógvi og á landi um jóltíðir.*

*Tosað verður um jesusbarnið, einglar, jólatónleik og pakkar. Annað gott, sum hoyrir jólunum til, verður eisini tikið fram.*

*Í hesi sendingini ætlar verturin at bjóða landkrabbum eins og sjógørpum eina hugnaliga og øðrvísi sending.*

*M.C. Restorff leggur sendingina til rættis.*

## Jól í miðlunum

**Árant Hansen ummælir**



Nú jólini veruliga nærkast, setur hetta sín serstaka dám á okkara fjølmiðlar. Frá morgni til myrkurs eru jólini á skránni við tónleiki, frásagnum, samrøðum og ikki minst lýsingum fyri øllum tí, ið jólamaðurin skal hava til okkum. Tað ljóðar møguliga troyttandi, tá tingini verða sett upp soleiðis. Men eg haldi ikki, at ov nógv verður gjørt burturúr. Hetta er myrkasta tíðin á árinum, vit eru júst farin um stytsta dag, og eg havi altíð hildið, at jólini eru eitt ljós í myrkrinum. Tó hava nakrar ónollur stungið seg upp í hesum sambandi, treyðugt so. At handilsfólk lýsa við teirra vørum er ein sjálvfylgja, tað er teirra yrki. Men at okkara listafólk, tónleikarar sum rithøvundar, enn hava eina turkatrúgv uppá, apropos jólini, at tað bert er møguligt at selja undan jólunum, tað eri eg troyttur av.

Mær dámar sera væl ummæli av tónleiki og bókum. Sjónvarp, útvørp og bløð gera eisini nakað við henda tátt. Men tað kemur so nógv út undan jólum, at bitin verður alt ov stórur hjá miðlunum at gloypa. Tú hevur heldur ikki ein verðsins kjans at keypa alt tað, ið kemur út. Víst nýta føroyingar nógvan pening til jóla, men, harragud, teir nýta pening hvønn dag. Tað hevði verið hugaligari at fingið ein javnari streym av útgávum og harvið ummælum.

SvF hevur sína sending, ið nevnist Bókajól. Henda varð send mánakvøldið í bestu senditíð. Ein góð og fjølbroytt sending, har Kári Sverrisson greiddi frá fløgu síni við gomlum skjaldrum. Áhugaverd og lítillátin var frásøgnin hjá Henningi Thomsen um bragdið við Samheitaorðabókini. Gleðiligt at hoyra, at hann ikki gevst her, men hevur sett sær sum mál at laga nýggjar bøkur til skúlabrúks. Malan Johannesen tók sær av sjónleikunum hjá Hanusi og Steinbirni. Hetta greiddi hon væl, men eg meini, at SvF skuldi gjørt meira við at fáa onnur fólk á skýggjan. Vit vita næstan frammanundan, hvat teir nógv nýttu kapasitetarnir meina um tingini. Tað sama er við Carl Jóhan Jensen, ið eftir øllum at døma verður dyrkaður sum ein guru av sjónvarpsleiðsluni. Maðurin veit nógv, og hann sigur sína meining uttan himpr, men tað finnast onnur, ið eisini kundu havt okkurt at sagt. Eg meini eisini, at tað ber brá av beinleiðis av hugmóð, at seta seg á skíggjan at kjakast um eitt yrkingasavn hjá Tóroddi Poulsen, sum kom út fyrr í vetur, uttan at geva síggjarunum betri kunnleika um innihaldið í savninum.

Sjálvsagt skuldu nakrar einstakar yrkingar verið lisnar upp saman við tekstunum á skíggjanum, tí eitt er heilt víst: tað eru tey fáu, ið hava lisið hetta savn. Soleiðis er nú einaferð við yrkingasøvnum.

Eivør Pálsdóttir slapp eisini framat, og merkisvert var at hoyra, hvussu henda unga stjørna er búnað innan tónleikalistina. Hevði bert roknað við at sjónvarpsupptøkurnar vóru gjørdar har, sum myndirnar til fløguhúsan vóru tiknar, í Blásastovu í Norðragøtu. Latum okkum njóta føroysku fjølmiðlarnar um jólini og minnast til, at í einum parti av landinum er Rás 2 til . Meiri um hetta seinni.

Gleðilig jól.

## Tror du på julemanden




## Jólamenninir tosa við børnini




## Alice i eventyrland




## Við langfaraskipi á Flemish Cap 1:2

